


# Carlsen systrarnar í fínum formi



## Leygardagin fyltu Carlsen systrarnar Vágsbø við frálíkum sangi

Dagfinn Olsen

Ein frálík sangløta við systrunum Carlsen. Við amerikanskum sletti í, høvdu tær eina frálíka góða framførslu, har góðu røddirnr verulga komu til sín rætt.

Fleiri høvdu óivað glett seg til hesa løtu, tí tað er ikki gerandiskostur at hoyra Leilu, Barbaru og Vanju á palii í Føroyum. Saman við manninum hjá Barbaru, Noah Chaparro, komu tær á pall saman við tónleikarum, og gjørdist hetta eisini ein sera góð løta, ið var fragd fyri oyruni.

Tær eru tiltiknir góðir sangarar og eru eisini av familju, har sangurin fyllir nógv, og har góðir sangarar teljast ímillum. Kendar eru tær og familjan eisini frá mongum útgávum.

Carlsen systrarnar hava eisini í nøkur ár verið á ferð í USA við tónleikinum, men nú var tað so Summar Festivalurin, ið fekk vitjn. Og hetta gjørdist ein løta við góðum huglag, har ein bleiv tikin við, tí vónleyst var at lurta, uttan at hetta kom innum og nart við.

Framúr væl sungið og spælt. Heilt einfalt sera, sera gott!

*dagfinn@sosialurin.fo*

# Fantastiskt Guðrið – FANTASTISKT!



## Guðrið Hansdóttir hevði í kvøld eina av teimum allar bestu konsertunum – um ikki ta bestu - sum hava verið á ársins festivali

Óli Jákup Jacobsen/Dagfinn Olsen

Har var einki at seta fingurin á. Guðrið sang sum ein dreymur, og tónleikararnir spældu sera væl. Um ein ikki visti betur, so hevði man trúð, at framførslan var playback. Men tað var tað ikki. Tann hálvfulli Vágsbøurin fekk eina eminenta konsert, sum fær teg at gloyma bæði tíð og stað.

Í glitrandi reyðum kjóla megnaði Guðrið at røkka langt út um Vágsbø við síni framúrskarandi – næstan guddómligu – rødd. Hon náddi ómakaleyst upp á hægstu tónar, og varð man sum áhoyrari borin gjøgnum konsertina.

Guðrið hevur sjáldan veruið betri. Hon er bara blivin betri og betri, síðani hon kom fram av álvara fyri nøkrum árum síðani. Og áhoyrararnir fegnaðust eisini og tað sást og kendist, har her fekk fjøldin nakað, ið henni dámdi.

Sjáldan hevur ein tími gingið so skjótt. Guðrið, hatta var fantastiskt.



# Birgit sang best

## Fríggjadagurin byrjaði við eini karaoke kapping, sum klaksvíksgentan Birgit Sivertsen vann.

Óli Jákup Jacobsen

Kappingin byrjaði við tveimum gentum, ið sungu Queen klassikaran We will rock you. Eftir tann sangin gekk lang løta, har eingin meldaði seg til. Veðrið var fínt, tá tað var turt og vindstilt, og nakað av fólki var savnað rundanum pallin.

Tá tað byrjaði at nærkast endanum, vóru tað tó fleiri, ið hóast alt vildu syngja. Tá kappingin var av, høvdu fimm luttakarar verið, har Birgit so streyk avstað við sigrinum. Birgit sang sangin hjá Bette Midler the Rose.

"Hetta var ordiliga kul. Eg hevði ikki væntað at vunnið, so hetta er ordiliga stuttligt," sigur Birgit.

"Eg havi altíð sungið, og elski eg at syngja. Sum 7 ára gomul luttók eg á barnaprixnum, og annars syngi eg til ymisk høvi. Men hetta er fyrstu ferð, eg vinni," sigur ein glað Birgit.

Eftir karaoke kappingina framførdi dansibólkurin Hóps tveir dansir.